# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Ása Hinson**, fødd Skrøder, ættað úr Havn, búsitandi í Humnanby í Onglandi, andaðist 11. mai, 73 ára gomul.

**Meinhard Forná úr Kvívík** andaðist á Landssjúkrahúsinum 12. mai, 82 ára gamal. Farið verður úr kapellinum fríggjadagin kl. 18 í Kvívíkar kirkju. Jarðarferðin verður úr Kvívíkar kirkju leygardagin kl. 14. Sungið verður úr sálmabókini.

**Dagurin**
**14. mai. Kristjan.** Teir vita einki um nakað halgimenni við hesum navni. Navnið er latínskt, gjørt eftir grikska navninum Kristos, sum aftur er týðing av tí hebráiska Messiah, ið merkir salvaður.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

# Framsýning við Olivur við Neyst

**Í morgin kl. 16 letur Olivur við Neyst, listamálari upp framsýning í Listaglugganum**



Við á framsýningini eru málningar og vatnlitsmyndir. Øll verk eru nýggj og eru myndevnini eisini nýggj, tó eru einstøk kend ímillum. 18 málningar og 6 vatnlitsmyndir myndað eina framsýning í hongur væl saman og er gjørv í litavali.

Olivur sigur: " Eg havi lagt meg eftir skrappun litum uttan tó at tað er eitt serstakt evni í verkunum. Eg máli tað sum fellur mær í huga, tó eru flestu myndirnar av náttúru ella fólkum í ymiskun høpi, t.d. í kava, í hoyna ella fólk í fiskivinnu."

Í bókini Livandi List, eftir Inger S. Sørensen stendur m.a.: " Útjavningin av tí dynamiska og tí harmoniska sæst aftur í litinum. Djúpir bláir, lilla og reyðir litir verða settir upp móti skríggjandi gulum og grønum litum. Myrkir bláir, reyðir og grønir litir verða settir upp ímóti ljósum gulum, grønum og bláum. Heitir reyðgulir, reyðir og brúnir litir verða settir upp ímóti køldum bláum. Spælið við mótsetningunum heldur fram soleiðis sum litirnir eru smurdir á løriftið. Onkrastaðni eru teir smurdir tjúkt og pastost á løriftið og aðrastaðni eru litirnir lagdir í tunnun nærum ósjónligum lagi, so løriftið sæst ígjøgnum málingina, og tað tykist sum eitt ljós kemur innanífrá. "

Framsýningin í Listaglugganum verður at síggja allan mai mánað.

Opið er týsdag – fríggjadag, kl. 15.00 – 17.30 og leygardagar 11.00 – 14.00.

Listagluggin heldur til í Niels Finsengøtu 25.

*mg*

# Realskúlamynd frá 1925



Mynd frá "Realskúlaframsýningini 1916-66", sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í 2007. Her er eitt fimleikalið í Realskúlanum í 1925.

**Aftasta rað f.v.:** Elisabeth (Ebba) Kamban (Petersen), Berghild Breckmann (Christiansen), Ella Rubeksen, Thomas Pauli Christiansen, Páll Jensen (á Dul), Mikkjal Helmsdal, Eliesar (Illeba) Johansen, Eivind Rubek Nielsen, Sigmund Hoydal, Jørgen Eilif Joensen, Gunnar Isholm, Sofia Debes, Hanna Bjørgheim, Helena Dam, og Dagny Nicodemussen.

**Miðraðið f.v.:** Anna Alberg, Lotte Philip Hansen, Lene Nicolajsen, Bente Hessenschmidt, Esther Mørk, Torbjørg Winther (Holm), Ása Mortensen (Vágsheyg), Lilly Jensen, og Mia (Maria) Weihe.

**Fremst f.v.:** Mourits Rubeksen, Samson Højgaard og Pauli Christiansen.

Um onkur hevur okkurt at viðmerkja í sambandi við myndina ella hevur hug at ogna sær hana, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánjalsdóttir á telefon: 226024. (Mynd nr. 258).

*Myndaeigari: Fornminnissavnið*